Hermann Oskarsson, Hagstova Føroya:

# Skjót samanlegging er frægast

**– Politikararnir taka avgerðirnar og síðan boða teir frá síni støðu. Hetta haldi eg er rætti máti at gera tað uppá, sigur Hermann Oskarsson, stjóri á Hagstovu Føroya. Hann vónar, at landsstýrið fer at arbeiða skjótt við málinum um samanlegging, soleiðis at pínan hjá teimum, sum kenna seg ótrygg við eini samanlegging, ikki verður drúgvari enn neyðugt**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



– Eg fekk fráboðanina um samanleggingina av Landsbankanum og Hagstovuni antin saman dag ella dagin fyri, at landsstýrismaðurin í tíðindaskrivi boðaði frá avgerðini hjá landsstýrinum og samgonguni.

Hermann Oskarsson sigur, at landsstýrið sjálvsagt hevur viðgjørt hetta málið politiskt, og tá ið politiska viðgerðin var liðug, og semja var um málsetningin, boðaði landsstýrið frá síni avgerð.

– Eg haldi, at hetta er rætti máti at gera tað uppá, sigur stjórin á Hagstovu Føroya.

*– Tað er tað ítøkiliga og administrativa í samanleggingini, sum er áhugavert, og fyrr enn vit kenna hesar ætlanir, haldi eg tað ikki vera rætt at gera nakrar serligar viðmerkingar til málið, sigur Hermann Oskarsson, stjóri á Hagstovu Føroya*

### Veit einki

Hermann Oskarsson sigur, at hann ánar ikki, hvussu landsstýrismaðurin ætlar at leggja stovnarnar saman.

– Eg veit bara, at landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at ein stýrisbólkur skal setast at standa fyri samanleggingini, og til at manna henda bólkin eru nevndir aðalstjórin í fíggjarmálaráðnum, stjórin á Gjaldstovuni og báðir stjórarnir í Landsbankanum og á Hagstovuni.

Stjórin á Hagstovuni hevur ikki hug at gera nakrar serligar viðmerkingar til samanleggingina, so leingi hann ikki veit, hvør ítøkiliga ætlanin hjá landsstýrinum er.

– Tað er tað ítøkiliga og administrativa í hesum, sum er áhugavert, og fyrr enn vit kenna hesar ætlanir, haldi eg tað ikki vera rætt at gera nakrar serligar viðmerkingar til málið, sigur Hermann Oskarsson.

Spurdur, um verandi stovnsleiðarar vita nakað um, hvar landsstýrið ætlar, at nýggi stovnurin skal halda til, sigur hann:

– Nei, tað veit eg einki um.

Hann vísir á, at Hagstovan húsast í sama bygningi sum eitt nú Fíggjarmálaráðið, men Hermann dugir ikki at síggja, hvussu pláss kann útvegast í verandi hølum fyri bæði hagstovu og landsbanka, um so skuldi verið.

Á Hagstovu Føroya arbeiða eini 15-16 fólk, og Hermann sigur, at hann leingi hevur ynskt sær fleiri fólk á stovnin.

Í Landsbankanum arbeiða eini 9-10 fólk.

### Arbeiða skjótt

Stjórin á Hagstovuni sigur seg vóna, at landsstýrið fer at arbeiða skjótt við hesum máli, soleiðis at pínan hjá teimum, sum kunnu kenna seg ótrygg við eini samanlegging, ikki verður drúgvari enn neyðugt.

– Tað er altíð keðiligt, tá ið fólk hava slíkar broytingar hangandi yvir høvdinum á sær ov leingi, heldur hann.

Hermann sigur seg hava skilt, at fyrsti fundur hjá stýrisbólkinum verður rættiliga skjótt, og tá verður so ætlandi sett hol á hetta arbeiði.

At enda vísir stjórin á Hagstovu Føroya á, at Hagstovan er ein meira "simpul" stovnur, sum savnar og ger hagtøl burtur úr tøkum taltilfari.

– Hinvegin er Landsbankin ein stovnur við "breiðari" uppgávum, sum umsitir pening og kredittvirðið hjá landskassanum, sigur Hermann Oskarsson.

## Sigurd og Bárður

Sosialurin royndi fyrrapartin í gjár at fáa fatur á landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Bárði Nielsen og stjóranum í Landsbanka Føroya, Sigurdi Poulsen, men hetta eydnaðist tíverri ikki fyri evstamark hjá blaðnum.

**-v.**



*Sigurd Poulsen er stjóri í Landsbanka Føroya*

Karsten Hansen, fyrrverandi fíggjarmálaráðharri:

# - Samanleggingin er okkara uppskot

**Karsten Hansen, fyrrverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at hann sum fíggjarmálaráðharri hevði fundir við stjórarnar í Landsbankanum og á Hagstovu Føroya um samanleggingar av stovnunum. – Báðir stjórarnir vóru samdir um, at meira hevði fingist burtur úr við eini samanlegging undir einum hatti**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Karsten Hansen heldur, at avgerðin hjá landsstýrismanninum, Bárði Nielsen og sitandi samgongu um at leggja Landsbanka Føroya og Hagstovu Føroya saman er gott.

– Hetta er okkara uppskot, sigur fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin.

Hann vísir á, at á landsstýrisfundi, 9. mai ár 2000, var upprit á skránni um samanlegging av Landsbankanum, Hagstovuni og Búskaparráðnum.

– Eg byrjaði hetta málið við at kunna fólkið á teimum stovnum, sum ætlanin var at leggja saman. Soleiðis vóru fundir bæði við Sigurd Poulsen, stjóra í Landsbankanum og Hermann Oskarsson, stjóra á Hagstovuni.

*– Eg ivist onga løtu í, at úrslitið hevði verið betur, um Landsbankin og Hagstovan arbeiddu saman og undir sama hatti, sigur Karsten Hansen, sum fegnast um, at sitandi landsstýrið nú ætlar at fremja hansara uppskot í verki*

Karsten sigur, at báðir stjórarnir vóru samdir um, at meira hevði fingist burtur úr við at leggja stovnarnar saman.

### Yvirlappa

– Tað er nú einaferð soleiðis, at stovnarnir yvirlappa hvønn annan í ávísum førum, og tá ið ov lítil orka er at arbeiða við í báðum stovnunum, hevði sjálvsagt meira komið burtur úr, um stovnarnir og harvið kunnleikin starvaðist undir sama taki.

Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin sigur, at landsstýrið og stovnsleiðararnir vóru samdir um, at skuldi ein samanlegging fremjast, so skuldi hølistrupulleikin eisini loysast.

– Men landsstýrið samdist ongantíð um, hvussu hølisviðurskiftini hjá samanlagda stovninum skuldu loysast.

Hann vísir á, at hugurin serliga lá til posthúsið á Argjum, men hesum setti Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, seg upp ímóti, tí hann vildi heldur, at floksfelagin og býraðsformaðurin í Havn, Jan Christiansen, skuldi hava bygningin til skúla.

– Hugskotið hjá mær við at hýsa samanlagda stovninum í hesum bygningi var, at so høvdu vit fíggjarliga umhvørvið savnað á einum staði á Argjum.

Karsten Hansen sigur, at málið um samanlegging av hesum báðum stovnum soleiðis steðgaði í hølisviðurskiftunum.

– Jú, mær dámar væl tankan um samanlegging, tí sum er brúka hesir stovnar partvís orku upp á somu metingar um samfelagsgongdina – og hvørgin stovnurin fær høvið at gera arbeiðið nóg gott. Eg ivist onga løtu í, at úrslitið hevði verið betur, um stovnarnir arbeiddu saman og undir sama hatti, sigur Karsten Hansen, sum fegnast um, at sitandi landsstýrið nú ætlar at fremja hansara uppskot í verki.



# Risastórt oljufund við markið

**Kann fáa stóran týdning fyri áhugan fyri 2. útbjóðing á okkara landgrunni**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Eitt oljusamtak við feløgunum ChevronTexaco, Statoil, Dong og OMV hevur eftir øllum at døma gjørt eitt risastórt oljufund beint við føroyska markið. Talan er um brunnin Lochnagar/Rosebank, sum varð boraður í summar við einum av heimsins størstu og mest framkomnu boriskipum, West Navigator – ein gamal kenningur frá boring á okkara landgrunni. Tíðindini, sum áður hava verið leysatíðindini í Sosialinum, men sum nú verða staðfest í altjóða oljublaðnum Uppstream, hava longu vakt miklan ans í altjóða oljuverðini. Upstream skriva, at fundin fer aftur at seta alt Atlantsmótið á heimskortið. Nú má roknast við, at altjóða oljuídnaðurin av álvara fer at skunda undir kanningar og boring í økinum millum Hetland og Føroyar.

Talan er helst um fyrsta stóra lønandi fundið á Atlantsmótinum síðani fyrst í 90-unum. At hetta kemur beint í kjalarvørrinum á tí 22. Útbjóðingini á bretska landgrunninum og nú beint undan tí føroysku 2. útbjóðngini kann neyvan heldur verða betri "timað". Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á oljufyrisitingini fegnast um tíðindini um, at eitt fund er gjørt so tætt upp at okkara markið, nú freistin at søkja um leiti- og kanningarloyvi á okkara landgrunni ikki er úti fyrr enn um góðan hálvan annað mánað.

Brunnurin er á 1115 metra dýpið og bert einar 7 fjórðingar frá markinum. Sambart Upstream er tað ov tíðliga enn at siga við vissu, hvussu stórt fundið er, men tøl sum 530 milliónir tunnur av olju verða nevnd. Blaðið skrivar eisini, at fundið "could open a new play fairway stradling the UK and Faroes Islands median line", tvs. at tað kann lata upp fyri eini tíð, har fund kunnu verða gjørt tvørtur um markið.

Ein kelda sigur við blaðið, at keldan minnir ikki sørt um tað risastóra oljufeltið Clair longur syðri. Men henda oljan skal vera av nógv betri slag. Sum skilt, so ætlar Chevron Texaco, sum er fyristøðufelag at bora ein avmarkingarbrunn longu næsta ár. Blaðið skrivar annars, at tað fara helst ikki at koma teir nógvu upplýsingar út um fundin, fyrr enn eftir 17. november, tá føroyska útbjóðingin letur aftur. Feløgini, sum hava gjørt hetta fundið, vilja nevniliga ikki lata øðrum kappingarneytum fleiri upplýsingar, tí tey ætla helst sjálvur at søkja um teigar á føroysku megin markið, sum liggja uppat hesum fundinum. Víðari verður upplýst, at líknandi fortreytir, sum tær í hesum nýggjasta fundinum, eru eisini í teigunum rundan um og hava feløgini í hesum sama samtakinum fingið tillutað lisensir í grannalagnum frá bretsku myndugleikunum. Nú kann so hugsast, at tey fara eisini at leggja boð inn til føroyskar myndugleikar at fáa lisensirnar, sum liggja beint hinumegin markið.

Sosialurin hevur annars skilt, at eitt fund, sum er gjørt nakað sunnan fyri henda seinasta brunnin, møguliga er lønandi. Talan er um Cambo/Lindisfarne brunnin, har Ameiada Hess er fyristøðufelag. Tað hevur ljóðað, at talan er um eitt stórt fund eisini.

Annars má sigast, at Statoil og Dong veruliga hava skotið "papageykin" í hesum seinasta fundinum, sum nú hevur fingið eigararnar av heimsins mest lisna oljublað, at rudda forsíðuna. Tað eydnaðist nevniliga feløgunum at keypa partar frá ChevronTexaco, áðrenn farið varð at bora í summar. Rúni Hansen, stjóri hjá Statoil í Føroyum og oddamaður fyri altjóða leiting hjá Statoil, sigur við Sosialin, at hann hevur onga viðmerking til tíðindini í Uppstream. Hinvegin má sigast, at er veruliga talan um eitt stórt fund, so eigur føroyski Statoilstjórin helst sín leiklut í tí, tí tað var hann, sum stórð fyri samráðingunum hjá Statoil at keypa upp 30% av loyvinum.

Tað er eisini áhugavert at síggja, at tað nettupp eru tvey feløg sum Statoil og Dong, sum eru við í loyvinum, tí hetta eru feløg, sum hava víst stóran áhuga fyri at víðka um sítt virksemi við Føroyar. Nú kann eisini so bara gita, at hetta seinasta fundið við markið, fer at gera tey uppaftur meira virkin og møguliga fáa tað risastóra oljufelagið ChevronTexaco við inn á føroyaøkið. Tað vita vit tann 17. november.



upstream
The International Oil & Gas Newspaper
West of Shetland on the rise
We Are Baker Atlas

*Forsíðan á altjóða oljublaðnum Upstream*




*Á kortinum síggja vit, hvat seinasta fundið er gjørt, Lochanager. Júst hinumegin markið, á føroyska landgrunninum, eru nógvir teigar við í útbjóðing. Beint sunnan fyri Lochnagar er Cambobrunnurin, sum keldur vilja vera við eisini er eitt fund. Tað er greitt, at er veruliga talan um tvey lønandi fund so stutt frá markinum, so kann hetta fáa alstóran týdning fyri áhugan at leita eftir olju og gassi á føroyskum øki. Kelda Upstream*

### Rýmdi av staðnum

Stutt eftir midnátt náttina til sunnudagin fór ein bilur við tveimum fólkum í út av vegnum við Húsarhaldsskúlan í Klaksvík. Tá ið løgreglan kom á staðið, var bilførarin rýmdur, men seinni somu nátt varð hann tikin, og blóðroynd varð tikin av manninum, tí illgruni var um rúsdrekkakoyring. Eingin fólkaskaði var, men bilurin gjørdist vrak, verður upplýst av politistøðini í Klaksvík.

**tn**

### Løgreglan leitar eftir harðskapsmanni

Náttina til sunnudagin varð ein maður sligin í Ítróttarhøllini á Hálsi. Maðurin breyt eina tonn, men harðskapsmaðurin, ið slóg, er ikki tikin enn. Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at løgreglan veit ikki enn, hvør maðurin er, men arbeitt verður við málinum. Vitnir til hendingina verða avhoyrd, og vónandi verður maðurin tikin sum skjótast.

**tn**

### Húsaófriðir loystir á staðnum

Tríggjar fráboðanir um húsaófrið vóru í Havn í vikuskiftinum. Í øllum trimum førum eydnaðist tað løgregluni at tosa partarnar til rættis, og ikki varð neyðugt at taka fólk við á støðina, verður sagt á politistøðini í Havn.

Nógv full fólk vóru eisini í býnum um vikuskitið, og í trimum førum varð neyðugt at taka fólk við á støðina at sova rúsin út, upplýsir vakthavandi á politistøðini. Eingin varð tikin fyri rúsdrekkakoyring í Havn um vikuskiftið.

**tn**